# Dømi um ársfrásøgn, sum hevur frávalt grannskoðan

**Skráseting Føroya**
FELAGSSKRÁSETING
Box 264 - FO-110 Tórshavn - Tlf. +298 35 60 10 - Fax +298 35 60 15 - E-mail
skr@skraseting.fo - www.skraseting.fo

Dømi um ársfrásøgn hjá einum smápartafelag, sum hevur frávalt grannskoðara.

Hendan leiðbeining er gjørd av Skráseting Føroya í 2016

## Inngangur

Hetta dømi um eina ársfrásøgn hjá einum Sp/f hevur Skráseting Føroya gjørt í 2016. Dømi uppfyllir ásetingarnar í ársroknskaparlógini tá ársfrásagnir verða settar upp. Talan er um eina ársfrásøgn sum ikki verður grannskoðað.

Sambært §135 í ársroknskaparlógini kunnu feløg lata ársfrásagnir inn til Skráseting Føroya, ið ikki eru grannskoðaðar. Fyri at velja grannskoðara frá, skal felagið í tvey fylgjandi roknskaparár, ikki fara uppum tvær av hesum støddum:

1. Fíggjarjavni 1 mió. kr. (ognin/skuldin ella aktiv/passiv)
2. Nettosøla á 2 mió. kr. (sølan/umsetningurin)
3. Meðal starvsfólkatal gjøgnum roknskaparárið á 12.

Eisini ber til at stovna eitt felag uttan at velja grannskoðara, um mett verður at omanfyristandandi treytir eru uppfyltar.

Tá ynski er um at velja grannskoðara frá, skal samb. § 88 stk. 1. nr. 3 í Vinnufelagslógini, á vanliga aðalfundinum (og ikki á einum eykaaðalfundi), samtykkjast, at komandi ársfrásøgn, ikki skal verða grannskoðað, sambært § 135, stk. 2 í ársroknskaparlógini.

Samtyktin um frával av grannskoðara skal standa í ársfrásøgnini undir leiðsluátekningini í tí ársroknskaparárinum avgerð verður tikin um frával,, sambært § 10a í ársroknskaparlógini. Harafturat skal leiðslan vátta í leiðsluátekningini á hvørjum ári, sambært § 9, stk. 4, í ársroknskaparlógini, at felagið lýkir krøvini til frával av grannskoðan.

Dømi fevnir sjálvsagt ikki um øll øki innan ársroknskap og loysir heldur ikki allar trupulleikar hjá øllum feløgum. Dømi skal tí bert nýtast sum íblástur at seta upp ársfrásøgnina.

# Sp/f Felag B

**Sp/f-Skrás.nr.: 1234**

## Ársfrásøgn

## 2015

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann _____ / _____ - 20_____ .

________________________________

Fundarstjóri Fundarstjórason

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2015** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 3 |
| Rakstrarroknskapur | 6 |
| Fíggjarstøða | 7 |
| Notur | 9 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2015 hjá Sp/f Felag B.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er mín fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnina gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og og av úrslitinum av felagsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2015.

Tað er mín fatan, at felagið lýkir treytirnar um frával av grannskoðan, vísandi til ÁRL § 135, stk. 2.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Norðdepli, tann 20. februar 2016

**Stjórn**

Malan Sanna Hansen
stjóri

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Sp/f Felag B<br>Gummaldsgøta 7<br>FO-730 Norðdepli | |
| | Telefon: | (+298) 500511 |
| | Sp/f-skrás.nr.: | 1234 |
| | V-tal: | 123.123 |
| | Kommuna: | Hvannasunds |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Stjórn** | Malan Sanna Hansen, stjóri | |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Sp/f Felag B er løgd fram eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri fyritøkur í flokki B.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrunda til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum viðvíkjandi upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagið, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumuleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði. Á henda hátt verður kurstap og kursvinningur býttur á ogn og skuld yvir tíðarskeiðið.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapur

**Bruttoúrslit**

Bruttoúrslit umfatar nettosølu, broytingar í goymslum av liðugvørum og vørum í gerð, arbeiði fyri egna rokning, sum er ognarført, aðrar rakstrarinntøkur og annan uttanhýsis kostnað.

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, leigu, tap av áognarum og operationellum leasingkostnaðum.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir eru rentuinntøkur og rentukostnaður, fíggjarligir kostnaðir av fíggjarligari leasing, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og kurstap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og handil í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum, umframt rentutilskriving á skyldugum skatti. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknaðir við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

**Skattur av ársúrsliti**
Skatturin í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**
Onnur útgerð, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð.

Útveganarvirðið er keypsprísurin, umframt kostnað, ið beinleiðis er knýttur at ognini, til hon er klár at taka í nýtslu.

Tær linieru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini og restvirðunum:

| | Livitíð | Restvirðið |
|---|---|---|
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 10 ár | 0-20 % |

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.
Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður uppgjørdur sum munurin millum sølupris og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavíst aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

**Vørugoymslur**
Vørur á goymslu verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum, rávørum og øðrum hjálpartilfari verður roknað sum keypsvirði, umframt flutningsgjald.

## Nýttur roknskaparháttur

Útveganarvirðið á lidnari vøru og arbeiði í gerð verður virðisásett til útveganarvirðið á rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði. Óbeinleiðis framleiðslukostnaður er óbeinleiðis tilfar og løn, umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni, harafturat kostnað til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

Nettorealisatiónsvirðið fyri vørugoymslur verður uppgjørt sum søluprísur, frádrigið kostnað til liðugtgerð og kostnað til at gjøgnumføra søluna. Nettorealisatiónsvirðið verður ásett við atliti at sølubæri, ókuransi og gongdini á væntaðum søluprísi.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur og skattaáogn verða tikin við í fíggjarstøðuna, sum roknaður skattur av skattskyldugu inntøkuni, við møguligum javningum av skatti frá undanfarnum árum. Skattur verður roknaður við 18%.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir muninum millum roknskaparliga og skattliga virðið á ognum og skyldum, uppgjørt við grundarlagi í ætlaðu nýtsluni av ognini ella hvussu skyldan skal rindast aftur.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimildaðum skattligum halli, verður inn-roknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í galdandi skattareglum og skattaásetingum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum eru avleiðingar av broytingum í skattasatsum, verða tiknar við í rakstrarroknskapinum.

**Skuld**

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, skuld til assosieraraðar fyritøkur og onnur skuld, verða tiknar við til amortiserað útveganarvirðið, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2015<br>kr. | 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Bruttoúrslit** | **218.889** | **60** |
| 2 | Starvsfólkakostnaður | -150.469 | -77 |
| | Av og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -13.818 | -14 |
| | **Rakstrarúrslit** | **54.602** | **-31** |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -2.003 | -6 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **52.599** | **-37** |
| 3 | Skattur av ársúrsliti | -9.463 | 6 |
| | **Ársúrslit** | **43.136** | **-31** |
| | | | |
| | **Uppskot til býti av úrsliti** | | |
| | Flutt úrslit | 43.136 | 0 |
| | Býtt frá fluttum úrsliti | 0 | -31 |
| | **Býtt tilsamans** | **43.136** | **-31** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | t.kr. |
| | **Støðisogn** | | |
| 4 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 55.271 | 69 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 55.271 | 69 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **55.271** | **69** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Framleiddar vørur og handilsvørur | 250.573 | 265 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 250.573 | 265 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 79.059 | 66 |
| | Útsett skattaáogn | 0 | 6 |
| | Onnur áogn | 0 | 11 |
| | Áogn tilsamans | 79.059 | 83 |
| | Tøkur peningur | 496.677 | 286 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **826.309** | **634** |
| | **OGN TILSAMANS** | **881.580** | **703** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## SKYLDUR

| | | 2015<br>kr. | 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 5 | Felagskapitalur | 80.000 | 80 |
| 6 | Flutt úrslit | 216.800 | 174 |
| | **Eginogn tilsamans** | **296.800** | **254** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsett til útsettan skatt | 1.531 | 0 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **1.531** | **0** |
| | **Skuld** | | |
| 7 | Skuld til peningastovnar | 105.000 | 0 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 105.000 | 0 |
| 7 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 20.000 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 233.640 | 231 |
| | Partafelagsskattur | 1.854 | 0 |
| | Onnur skuld | 222.755 | 218 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 478.249 | 449 |
| | **Skuld tilsamans** | **583.249** | **449** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **881.580** | **703** |

**1 Høvuðsvirksemi felagsins**

**8 Veðsetingar og trygdarveitingar**

# Notur

1. **Høvuðsvirksemi felagsins**

Felagið rekur matvøruhandil/landhandil í Norðdepli.

| | | 2015<br>kr. | 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **2.** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir og samsýningar | 148.243 | 77 |
| | Aðrar útreiðslur viðv. sosialari trygd | 2.226 | 0 |
| | | **150.469** | **77** |
| **3.** | **Skattur av ársúrsliti** | | |
| | Skattur av ársúrsliti | 1.854 | 0 |
| | Broyting í útsettum skatti | 7.609 | -6 |
| | | **9.463** | **-6** |

**4. Materiell støðisogn**

| | **Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv**<br>**kr.** |
|---|---|
| Útveganarvirði primo | 138.182 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **138.182** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 69.092 |
| Avskrivingar í árinum | 13.819 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **82.911** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **55.271** |

| | 31/12 2015<br>kr. | 31/12 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|

### 5. Felagskapitalur

| | 31/12 2015<br>kr. | 31/12 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|
| Felagskapitalur primo | 80.000 | 80 |
| | **80.000** | **80** |

### 6. Flutt úrslit

| | 31/12 2015<br>kr. | 31/12 2014<br>t.kr. |
|---|---|---|
| Flutt úrslit primo | 173.664 | 205 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 43.136 | -31 |
| | **216.800** | **174** |

### 7. Skyldur

| | **Avdráttir fyrsta árið kr.** | **Restskuld eftir 5 ár kr.** | **Skuld tilsamans 31/12 2015 kr.** | **Skuld tilsamans 31/12 2014 t.kr.** |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til peningastovnar | 20.000 | 25.000 | 125.000 | 0 |
| | **20.000** | **25.000** | **125.000** | **0** |

### 8. Veðsetingar og trygdarveitingar

Sum trygd fyri skuld til peningastovnar, 125 t.kr., er latið veð í rakstrargøgnunum, har roknskaparligu virðini tann. 31. desember 2015 eru 55 t.kr.